

# ERGOTERAPEUTAR
## ella FYSIOTERAPEUTAR
### til Hjálpartólamiðstøðina (HTM)

**Hevur tú hug at arbeiða á einum almennum stovni, har arbeiðsdagurin ikki stendur stillur, og uppgávurnar eru nógvar, spennandi, fjølbroyttar og avbjóðandi – ja so hava vit júst brúk fyri tær!**

*Umsóknarfreist: mánadagin 03. november 2008 kl. 14.00.*

Tvey av starvsfólkum okkara hava, eftir drúgva starvstíð á HTM, leita sær aðrar avbjóðingar og tí er á HTM tvey størv sum ráðgevandi og málsviðgerandi Ergoterapeutar ella Fysioterapeutar leys at seta beinan vegin. Annað starvið er tó fyribils til 31. juli 2009, men við møguleika fyri føstum starvi.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna. (Onnur arbeiðstíð kann avtalast).

**Vit søknast eftir starvsfeløgum sum hava**
- útbúgving sum ergoterapeutur ella fysioterapeutur

**Ynskiligt er at umsøkjari hevur**
- royndir frá líknandi arbeiði
- royndir og/ella kunnleika til at arbeiða við fólki við niðursettum førleika
- kunnleika til almannalóggávuna
- evnir at seta í verk fyriskipanir
- góð samstarvsevnir
- góð evnir at orða seg bæði munnliga og skriftliga
- góðan telduførleika

**Vit kunnu bjóða**
- førleikamenning innan- og uttanhýsis
- fakligt mennandi umhvørvi
- tvørfakligt samstarv
- tætt samstarv við starvsfelagar
- sjálvstøðuga tilrættisleggjan av arbeiðsdegnum
- flextíð

Á HTM leggja vit í umsitingini dent á virðing fyri borgaranum, rættartrygd, gjøgnumskygni, fakliga dygd, kunning og áhaldandi menning.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen, leiðara á HTM, á telefon 358300.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn, ella við telduposti til htm@almannastovan.fo

HTM er stovnur undir Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 12 fólk á HTM.

**Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.**
- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar
- tvørfakligt samstarv – innan- og uttanhýsis.

HTM
HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐIN
htm@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

KREA



# »Eg havi innlit í míni útlit«

Mær nýtist ikki at stúra. Hvørki fyri mær sjálvari, makanum ella børnunum.

Snýr tað seg um lívstrygging, óarbeiðsføristrygging ella eftirløn, fært tú altíð bestu ráðgevingina frá Lív. Vit taka støði í tínum tørvi.

Við Lív fært tú innlit í tíni útlit.

Innlit í útlit

www.liv.fo

SENDISTOVAN